Skrivligur fyrispurningur
eftir § 53 í Tingskipanini

Spyrjari: Sámal Petur í Grund, løgtingsmaður

Svarari: Bárður á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum

Evni: Málbólkur og upptøka á Rásini

Spurningar:

1. Er reglugerðin fyri Rásina frá 2016 framvegis galdandi?
2. Hvør er málbólkurin fyri Rásina í dag?
3. Hvørjar fortreytir/ hvørji krøv verða nýtt við upptøku á Rásina?
4. Verður sjálvbjargni lagt til grund sum fortreyt/ krav við upptøku á Rásina?
5. Verður stuðuls- ella hjálpartørvur lagdur til grund við avgerð um upptøku á Rásina?
6. Hvussu nógv søktu um upptøku á Rásina til skúlaárið 2026/2027?
7. Hvussu nógvir av umsøkjarunum til skúlaárið 2026/2027 sluppu ikki inn?
8. Hvørjar vóru høvuðsorsakirnar til ikki at sleppa inn til skúlaárið 2026/2027?
9. Hvussu er visitatiónsbólkurin fyri Rásina mannaður?
10. Metir landsstýrismaðurin, at núverandi upptøkupraksis samsvarar við málbólkin í reglugerðini fyri Rásina?

Viðmerkingar:

Rásin er sambært reglugerðini frá 2016 ein samdøgursstovnur til ung við menningartarni. Í § 3 verður málbólkurin ásettur at vera ung við menningartarni, sum eru liðug við fólkaskúlan. Har verður eisini ásett, at menningartarnið kann vera ymiskt, hóast ynskiligt er, at næmingarnir eru á nøkulunda sama menningarstøði.

Sambært § 5 skal Rásin veita næmingunum eitt heildartilboð, sum fevnir um bústað, arbeiði og fakliga menning. Innihaldið skal í høvuðsheitum vera verklig læring og menning við støði í førleikunum hjá tí einstaka.

Á heimasíðuni hjá Rásini verður dentur lagdur á, at arbeiðið tekur støði í hvørjum einstøkum næmingi, og at næmingarnir skulu mennast til at gerast so sjálvbjargnir sum til ber, við atliti at fortreytunum hjá tí einstaka. Sjálvbjargni verður sostatt lýst sum eitt mál við skúlagongdini. Á heimasíðuni sæst ikki, at eitt ávíst stig av sjálvbjargni er sett sum almenn upptøkutreyt.

Í tilmælinum frá 2015 um serliga skipað miðnám varð mælt til at varðveita og víðka Rásina. Málbólkurin skuldi víðkast, soleiðis at eisini ung við øðrum avbjóðingum enn menningartarni kundu fáa møguleika at ganga á Rásini. Tað varð eisini mælt til, at næmingar skuldu takast inn hvørt ár, og at samlaða næmingatalið skuldi økjast úr 7 til 14 ella fleiri.

Rásin er síðani útbygd. Í løgmansfrágreiðingini frá 2025 varð upplýst, at útbyggingin skuldi geva Rásini møguleika at hava tvífalt so nógvar næmingar og taka sjey næmingar upp á hvørjum ári.

Tørvur er á at fáa lýst, um ung við størri menningartarni og størri stuðuls- ella hjálpartørvi hava sama reella møguleika at verða upptikin á Rásina sum onnur í málbólkinum.

Sambært § 7 í reglugerðini tekur visitatiónsbólkurin avgerð um upptøku, og sambært § 10 hevur landsstýrismaðurin í mentamálum yvirumsjón við stovninum.

Tí verður landsstýrismaðurin biðin um at greiða frá málbólkinum, kriteriunum og núverandi upptøkupraksis og um, hvussu hetta samsvarar við reglugerðina og endamálið við Rásini.

Á Løgtingi, 10. november 2026

Sámal Petur í Grund